52-107/2023

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

10. apríl 2024
Mál: 24/06650

Tygara skriv: 52-107/2023

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-107/2023 frá Jacob Vestergaard, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um arbeiðsfólkið í Dalstunlinum**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví verður søkt eftir arbeiðsfólki til arbeiðið í Dalstunlinum?
2. Hvar er arbeiðsfólkið, sum arbeiddi í Dalstunlinum?
3. Er ósemja ímillum arbeiðsfólkið í Dalstunlinum og Landsverk, og um so er, hvar snýr ósemjan seg um?

**Svar**:
Tað starvast vanliga 6-7 arbeiðsfólk á tunnilsliðnum hjá Landsverki. Arbeiðið við Dalstunlinum hevur sum heild gingið væl. Fyrsta skotið fyri tunlinum varð latið 5. november 2020, og tunnilin varð skotin ígjøgnum 9. novembur 2023.

Fyrr í ár søgdu trý arbeiðsfólk seg úr starvi. Orsøkin var, at tey vóru ónøgd við lønarviðurskifti og setanartreytir í sambandi við tunnilsarbeiðið. Lýst varð tí eftir starvsfólki, og eru fólk sett í starv.

Arbeiðið inni í tunlinum varð nakað seinkað, meðan lýst varð eftir fólki, men nú gongur arbeiðið, eftir ætlan.

Sum kunnugt verður Tjørnuvíkartunnilin fyrireikaður. Ætlanin er, at tunnilsliðið hjá Landsverki skal arbeiða við at gera Tjørnuvíkartunnilin.

**Dennis Holm**
*landsstýrismaður*

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo